# Ein lætti at ein avgerð nærkast



*– Tað er ein lætti, at spurningurin um framtíðina hjá Atlantsflogi nú av álvara nærkast eini endaligari avgerð, sigur Magni Arge, stjóri í felagnum*

**Magni Arge sær nú fram til at tað gongur skjótt og smidligt hjá Løgtinginum at avgreiða málið um at einskilja Atlantsflog, tí so kann hann ikki krevja meiri**

EINSKILJINGIN AV ATLANTSFLOGI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg eri sera fegin um, at alt talar fyri, at tað er at kalla full semja í Løgtinginum um framtíðina hjá Atlantsflogi.

– Tað sigur Magni Arge, stjóri í flogfelagnum.

Hann hevur altíð sagt, at hann vil ikki gera viðmerkingar til, um tað er rætt ella ikki at einskilja Atlantsflog og í so fall, hvussu stórur partur av felagnum skal einskiljast.

Og hann leggur dent á, at tað vil hann framvegis ikki gera viðmerkingar til.

– Tað er ikki mítt borð at taka støðu til tað, tí tað er ein politiskur spurningur burturav, sum Løgtingið eigur at taka støðu til.

Men nú er eitt uppskot lagt fyri Løgtingið um at einskilja Atlantsflog og Magni Arge fylgdi sjálvsagt við kjakinum fríggjadagin.

Og hann dylir ikki fyri, at hann er sera fegin um orðaskiftið í Løgtinginum.

– Eg eri sera fegin um, at tað vísir seg at vera so stór semja í Løgtinginum tvørturum samgongu og andstøðu um framtíðina hjá Atlantsflog.

Hann er eisini sera fegin um, at tað varð eitt siðiligt og uppbyggjandi orðaskiftið í Løgtinginum um flogfelagið.

Tað heldur hann, hevur sera stóran týdning fyri framtíðina hjá felagnum.

Magni Arge heldur, at tað hevur sera stóran týdning, at framtíðin hjá Atlantsflogi ikki verður eitt politiskt stríðsmál, sum Løgtingið skal hava til politiska viðgerð, hvørja ferð, vit fáa eina nýggja samgongu.

– Tað einasta, sum nú manglar, er, at málið verður avgreitt bæði skjótt og smidligt í Løgtinginum, tí so kann eg ikki krevja meiri.

Stjórin í Atlantsflog sigur, at skuldi Atlantsflog enda í einum politiskum slagsmáli, hevði tað órógva felagið og starvsfólk og tað hevði eisini ávirkað felagið.

– Tað er aldrin gott at vera í óvissu um, antin felagið rekur hendavegin ella hinvegin og tí hevur tað stóran týdning, at tingmenn sum heild draga somu línu.

Hann heldur, at tað virkaði eisini sum um at tinglimir vóru ógvuliga tilvitaðir um, hvønn týdning tað hevur fyri felagið, at tað hevur tryggar karmar at virka undir.

Tí heldur hann eisini, at tað hevur stóran týdning, at ein greið avgerð nú verður tikin um framtíðina hjá Atlantsflog, hvør avgerð tað so enn verður.

Og hann heldur eisini, at tað hevur stóran týdning, at tingið verður so samt sum gjørligt um avgerðina, so at felagið ikki alla tíðina skal órógvast av spurninginum um, hvussu leingi avgerðin nú fer at halda. Tí vónar hann ikki, at avgerðin dregur út, uttan tó at hann vil hava løgtingið at hurla málið ígjøgnum, tí hann sær eisini týdningin av eini dyggari viðgerð og eini vælumhugsaðari, politiskari avgerð.

Hann heldur ikki, at tað higartil hevur nervað felagið, at framtíðin hevur verið óviss.

– Tað er ikki komið hartil enn, men tað er altíð torført at vita, hvussu vit skulu fyrihalda okkum, so leingi spurningurin um framtíðina ikki er avgreiddur og tað ávirkar sjálvsagt onkusvegna.

– Tí er tað ein lætti, at málið nú er komið so langt, sum tað er komið.

Nú stjórin í Atlantsflogi sær fram til at málið verður avgreitt bæði smidligt og skjótt, merkir tað á ongan hátt, at hann heldur at tað er rættast at einskilja Atlantsflog.

Hann hevur heldur onga meining um, antin tað er rættast at einskilja 33% ella 66% í hesum umfari.

- Tað leggi eg meg als ikki út í. Tað, sum hevur týdning fyri meg, er, at Løgtingið kemur til eina semju um framtíðina hjá Atlantsflogi, hvat tað so verður, tí so vita vit, hvat vit hava at halda okkum til, sigur Magni Arge.

# Koma og fara 50 ferðir um vikuna

**Í fjør hevði Atlantsflog eitt uppafturstørri avlop enn í fyrrárið og tá var tað 14 milliónir eftir skatt**

ATLANTSFLOG

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Atlantsflog hevði aftur eitt gott ár í fjør og í summar fer felagið at flúgva so nógv sum ongantíð fyrr*

Atlantsflog økir alsamt um flúgvingina.

Í summar fer Atlantsflog at hava heilar 50 fráferðir av flogvøllinum í Vágum um vikuna. Samstundis fara flogfør hjá felagnum at koma til flogvøllin í Vágum 50 ferðir um vikuna.

Sostatt fara fer Atlantsflog at hava fleiri fráferðir og komur um flogvøllin í Vágum hvørja einastu viku, enn føroyingar høvdu eitt heilt summar fyri einum 20 árum síðani.

Samstundis hevur Atlantsflog fleiri fráferðir úr Danmark og úr Noregi til onnur ferðamál enn Føroyar.

Alt hetta merkir, at í summar fer Atlantsflog at flúgva uppaftur meiri enn tað gjørdi í fjør og ferðslan í ár verður tann mesta í søgu felagsins higartil.

Magni Arge sigur, at økingin í ferðsluni byrjar so smátt seinast í hesum mánaðinum og kemur í hæddina síðst í juni.

Størsta økingin verður í flúgvingini til og úr Jútlandi í Danmark, tí hon fer at økjast tríggjar túrar um vikuna í háárstíðini, men Atlantsflog fer eisini at flúgva tvær ferðir afturat um vikuna til Íslands um vikuna

Magni Arge sigur, at hendan økingin hevur onki við tað at gera, at Faroe Jet fer at taka kappingina upp nú í vár.

– Summarferðaætlanin varð løgd í september í fjør og tá vistu vit ikki so nógv um Faroe Jet. Men at vit fáa eitt flogfelag afturat, hevur so fyribils heldur ikki fingið okkum at endurskoða ferðaætlanina, sigur stjórin í Atlantsflogi. Vit hava lagt eina ferðaætlan útfrá einum mettum tørvi, so fáa vit at síggja, hvussu tað verður, leggur hann afturat.

Magni Arge minnir á, at tá ið Maersk Air gavst at flúgva, vóru tað mong, sum vóru rættiliga svartskygd um flúgvingina, tí tey mettu, at tað fór at verða bæði verri og dýrari.

Men hesa tíðina, Atlantsflog hevur verið einsmalt um flúgvingina, er ferðslan økt hvønn einasta mánaða. Í fjør vaks ferðafólkatalið um flogvøllin í Vágum 10% og tað er størsta økingin í flúgvingini nakrantíð upp á eitt ár.

Í fjør ferðaðust sostatt 190.000 fólk umvegis flogvøllin í Vágum.

Magni Arge dylir ikki fyri, at hann er errin av úrslitinum.

– Hetta úrslitið kemur í eini tíð, har stígur annars var í føroyska búskapinum. Men hetta er eitt úrslit av, at vit hava havt fleiri ferðatilboð, bíligari prísir og eina smidliga prísskipan.

Annars er Magni Arge vælnøgdur við fíggjarligu gongdina í Atlantsflogi.

Hann er enn ikki til reiðar at avdúka úrslitið fyri í fjør.

– Men tað sær gott út, sigur hann kortini.

Í 2004 hevði Atlantsflog 17 milliónir í avlopi fyri skatt og 14 milliónir eftir skatt.

Og Magni Arge staðfestir, at úrslitið í fjør er uppaftur frægari, sjálvt um felagið hevur havt eyka útreiðlur av olju og av ringum veðri.